Búskapur og vinna:

## Minni bygging

Virksemið í donsku byggivinnuni minkaði nógv seinasta ársfjórðingin í fjør. Húsa- og íbúðarbyggingin minkaði 12 prosent, samstundis sum nýbygging innan vinnulívið minkaði 18 prosent samanborið við seinasta ársfjórðingin í 2000.

Tann stóra minkingin í húsa- og íbúðarbyggingini kemur óvart á bæði byggivinnuna og myndugleikarnar, tí frammanundan var virksemið í hesum partinum av byggivinnuni tað minsta í tíggju ár.

## Heimsbankin til Oslo

Leiðslan í Heimabankanum hevur gjørt av, at ársfundurin hjá evropeisku deild bankans í ár skal haldast í Oslo og ikki í Stockholm sum upprunaliga ætlað. Fundurin verður í døgunum frá 24. til 26. juni. Norska uttanríkisráðið verður vertur fyri fundinum, og norski menningarmálaráðharrin, Hilda Frafjord Johnson, verður ein av røðarunum.

Í fjør skuldi Evropadeildin hjá Heimsbankanum halda ársfund í Barcelona, men fundurin varð avlýstur, tí fyrireikararnir bóru ótta fyri, at mótmælisfólk fóru at skipa fyri ófriði. Hví bankin nú hevur valt at flyta fundin í ár úr Stockholm til Oslo, vil norska uttanríkisráðið ikki siga nakað um, men tað er ikki óhugsandi, at leiðslan hevur ófriðin undir toppfundinum hjá ES í Gøteborg í fjør í huga.

Í norska uttanríkisráðnum siga tey, at myndugleikarnir fara at skipa fyri teimum neyðugu trygdartiltøkunum í sambandi við fundin í summar.

## Fasta rentu

Norski Húsbankin mælir nú húsaeigarum til at taka lán við fastari rentu. Samstundis egnir bankin vð, at tað loysir seg at taka lánið nú, tí tey, sum bíða, fáa ikki somu lágu rentuna. Húsbankin sigur, at tey, sum taka lán í gebruar, fáa rentuna 6,2 prosent. Bíða tey til næsta mánað, skulu tey rinda 6,4 prosent, og bíða tey til apríl, verður rentan 6,5 prosent.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# USA verður verandi í Asia

**Amerikanski forsetin, George W. Bush, kom í gjár til Suðurkorea eftir at hava verið í Japan. Har lovaði hann, at USA fer at varðveita sína hermegi í Asia**

USA OG ASIA
*Árni Joensen*



*George W. Bush, forseti á røðarapallinum í japanska tjóðartinginum*

*Mynd: Reuters*

Tað var í einari røðu í japanska tjóðartinginum, at George W. Bush, forseti boðaði frá, at USA ætlar at varðveita sína hermegi í Asia. Hann gjørdi samstundis greitt, at USA fer at verja Suðurkorea ímóti øllum ágangi, og at stjórn hansara fer at fullføra ætlanina um eina rakettverjuskipan.

Bush greiddi japansku politikarunum frá, at hann er til reiðar at nýta amerikanska megi til at hjálpa londum sum Avstralia, Thailandi og Filipsoyggjunum. Amerikanskir hermenn komu herfyri til Filipsoyggjarnar. Sambært stjórnini í Washington skulu hermenninir hjálpa stjórnarherinum í bardaganum ímóti yvirgangsmonnum, sum verða hildnir at hava samband við felagsskapin al-Qaeda hjá Osama bin Laden.

- USA eigur at vera í hesum partinum av heiminum. Vit hava ongantíð verið so sannførdir um hetta sum nú, segði Bush í japanska tjóðartinginum.

Hann segði seg ikki ivast í, at Japan fer at koma burtur úr teimum búskaparligu trupulleikunum, sum landið hevur at dragast við. Júst búskapurin var eitt av høvuðsevnunum í samráðingunum millum Bush og japanska forsætisráðharran, Junichito Koizumi.

Í gjár kom Bush til suðurkoreanska høvuðsstaðin Seoul. Har høvdu myndugleikarnir skipað fyri sera umfatandi trygdartiltøkum, tí nógvir suðurkoreanar hava mótmælt, at Bush herfyri tengdi grannalandið Norðurkorea at Iran og Irak.

Úr Suðurkorea fer Bush til Kina, sum er seinasta landið, hann vitjar á Asiaferðini.

# Skotsk innrás í Spania

**Bretland gjørdi mánadagin innrás í Spania, tá ein deild av skotskum hermonnum fór á land á sponsku suðurstrondin. Men innrásin var eitt mistak**

HERNAÐARVENJING
*Árni Joensen*

Teir 20 servandu skotsku hermenninir úr Deild 45, sum vanliga heldur til í Aberdeen, lupu mánadagin á land á suðursponsku strondini vápnaðir við maskinbyrsum og trimum bumbuvarparum. Teir vóru ikki meiri enn komnir niðan frá sjóvarmálanum, tá teir varnaðust, at teir vóru mitt í einum íbúðarøki.

Tað vísti seg, at teir vóru komnir til býin La Linea, sum er tætt við markið millum Spania og Gibraltar. Í mong ár var hetta markið stongt og ógvuliga væl vart, tí Spania krevur framvegis at fáa Gibraltar, sum onglendingar hersettu í 1704.

Skotsku hermenninir vóru í ferð við at grava sær skotgravir niðari á sandinum, tá nakrir løgreglumenn í La Linea komu at fregnast eftir, hvat teir tókust við. Tá løgreglumenninir skiltu, hvussu vorðið var, greiddu teir skotunum frá, at teir høvdu mistikið seg, tí Gibraltar var longur suðuri.

Skotsku hermenninir, ið sum vera man vóru illa við, tóku vápnini og hina útgerðina og kvikaðu sær burtur.

Bretska verjumálaráðið hevur biðið borgarstjóran í La Linea um umbering fyri mistakið hjá hermonnunum, skrivar skotska blaðið Daily Record.

Úr Norðurlondum:

## Fongsulsreglur kannast

Leiðslan í norsku løgregluni umhugsar í løtuni, um hon skal endurskoða reglurnar, sum siga, hvussu hon skal ansa eftir teimum, sum verða sett í varðhaldið beint eftir handtøku.

Upprunin til málið er ein tilburður í varðhaldinum á løgreglustøðini í Hamar seinastu leygarnátt. Har doyði ein 19 ára gamal maður, sum løgreglumenninir høvdu lagt í ein kliva at sova rúsin av sær.

Einstakir politikarar hava tikið málið upp og kravt, at løgreglan fær greiðari reglur at arbeiða eftir í tílíkum førum. Sambært galdandi reglum skal løgreglan boðsenda lækna, um hon heldur tað vera neyðugt, men í orðaskiftinum seinastu dagarnar er komið fram, at tað kann vera trupult hjá løgreglumonnunum at meta um, nær teir eiga at senda boð eftir læknanum.

## Mótmæla ferðaætlan

Tað vakti stóran ans, tá danska stjórnin herfyri gjørdi av at lata bretska tokfelagið Arriva fáa rættindni til fleiri tokleiðir í Mið- og Vesturjútlandi. Sambært stjórnini var tilboðið hjá bretska felagnum betri enn tilboðið hjá almenna danska tokfelagnum DSB.

Arriva hevur lovað, at fólk skulu fáa minst líka gott ferðasamband sum tað, DSB hevur, men nú vísir tað seg, at hetta lyftið fer neyvan at halda. Arriva hevur lagt eitt uppskot um ferðaætlan, men fólk í Mið- og Vesturjútlandi eru alt annað enn nøgd.

Sagt verður, at ferðirnar verða væl færri enn í dag, og harafturat er ferðaætlanin sera óheppin fyri tey, sum koyra við toki til arbeiðis ella í skúla. Eisini vinnulívið fýlist á uppskotið.

Arriva hevur fleiri tokleiðir í Bretlandi og Hollandi, og í seinastuni er komið fram, at felagið hevur sera trupult við at halda sínar ferðaætlanir. Nú bera mong í Jútlandi ótta fyi, at tað saa skal henda har.

# ítróttur

Nr. 35 • mikudagur • 20. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# FSF telvaði til UG í Týsklandi

**Jógvan Martin Olsen heldur ikki, at tað hevði borið til at fingið eina betri leikskrá, enn hana, sum í gjár kom fram burtur úr ferðini til Týsklands**

EM UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*



*Jógvan Martin Olsen, virkandi landsliðsvenjari, er sera fegin um lutakastið*

Føroyska landsliðið hevur fingið so góðar treytir at avgreiða komandi EM undankappingina undir, sum tað á nakran hátt ber til. Hetta er niðurstøðan, eftir at fundurin millum FSF-umboðini og umboðini fyri tey londini, sum Føroyar eru í EM undankappingarbólki saman við, var liðugur á middegi í gjár.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, var í Frankfurt í gjár saman við Mortani Poulsen. Aðalskrivarin er sera væl nøgdur við tað, sum FSF hevði fingið burturúr:

– Eg havi sagt tað áður, og tað varð enn eina ferð staðfest. Flestu europeisku fótbóltstjóðirnar kenna umstøðurnar og karmarnar hjá okkum. Tey vita, at hjá okkum ber tað bara til at spæla á heimavølli frá mai og til september. Einasta landið, sum vit nú eru í bólki saman við, og sum vit ikki áður hava spælt ímóti, er Týskaland. Í síðstu viku tosaði eg við aðalskrivaran í týska fótbóltssambandinum. At hann hevði skilt okkara støðu, var sjón fyri søgn á fundinum í dag, segði ein sera væl nøgdur Ísak Mikladal úr Frankfurt á middegi í gjár.

Og tað er ikki so undarligt, at Ísak Mikladal og hinir, sum hava við føroyskan landsliðsfótbólt at gera, eru væl nøgdir við skránna. Í heyst eru tríggir dystir á skránni. Føroyar skulu 7. sept. spæla á heimavølli ímóti Skotlandi. Í oktober verður einasta uttanlandsferðin við tveimum dystum. 12. okt. verður spælt í Litava, og 16. okt. verður stórdysturin á útivølli ímóti Týsklandi.

Komandi ár verður bara spælt í juni, august og september. 7. juni skulu føroyingar spæla á útivølli ímóti Íslandi. 11. juni verður heimadysturin ímóti Týsklandi. 20. august skal Ísland vitja í Føroyum, 6. sept. skulu Føroyar spæla í Skotlandi, og síðsti dysturin verður 10. september á heimavølli ímóti Litava.

### Jógvan Martin tryggjar yvirgongdina

Jógvan Martin Olsen, sum síðani 1996 hevur verið hjálparvenjari hjá Allani Simonsen, og sum hevði ábyrgdina á Kypros fyrr í hesum mánaðinum, er eisini væl nøgdur. Jógvan Martin er venjari hjá NSÍ. Ísak Mikladal vónar, at tað fer at bera til at fáa hjálparvenjaran at hjálpa nýggja venjaranum, tá Skotland kemur at vitja í september.

Jógvan Martin Olsen er sum vera man eisini fegin um lutakastið:

– Vit sleppa undan dystum í mars og apríl. Tá vit fara at spæla í heyst eiga spælararnir at vera væl fyri, og komandi ár verður bara spælt í teimum mánaðunum, tá fótbólturin í Føroyum er upp á sítt hægsta. At vit fýra dagar framman undan heimadystunum ímóti Týsklandi og Litava skulu spæla útidystir ímóti ávikavist Íslandi og Skotlandi hevur einki at siga. Tað er bara ein tími at flúgva, og umstøðurnar eru kendar, staðfestir Jógvan Martin Olsen.

# B68 hevur fingið málverja úr Póllandi

**25 ára gamli maðurin hevur tvey tey seinastu árini verið í feløgum, sum hava spælt í bestu deildini í Póllandi**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Í fyrradagin kom ein málverji úr Póllandi og til Toftir. Talan er ikki um tann málverjan, sum tað fyri einum fjúrtan døgum síðani ljóðaði frá skuldi koma til B68, men um ein annan málverja.

Niclas Davidsen, formaður í B68, sigur, at málverjin, sum teir í fyrstu atløgu vóru í sambandi við, gav avboð, tí hann hevði fingið eitt gott tilboð frá einum felag, sum er umboðað í bestu pólversku deildini. Tá hesin málverjin gav avboð, segði hann seg vilja royna, at finna ein annan málverja til B68. Tað eydnaðist honum rættuliga skjótt, og nú er hesin maðurin komin.

– Hann eitur Michal Kokoszanek. Hann er ættaður úr Poznam, og hann er 25 ára gamal. Í fjør spældi hann í einum felag, sum eitur Amica Wronki. Hetta felagið er umboðað bæði í bestu og næstbestu deildini. Nýggi málverjin hjá okkum var í 1. deildar hópinum. Hann var viðhvørt á besta liðnum, og tá hann ikki var har, so spældi hann í næstbestu deildini. Í fyrraárið vardi hann málið hjá einum felag í bestu deildini, sum eitur Lech Poznam, veit B68 formaðurin at siga.

### Kapping um plássið

Nýggi B68 málverjin, sum er 188 cm høgur, hevur spælt fleiri dystir á yngru landsliðunum. Tí kundi verið líkt til, at hann átti at verið sjálvskrivaður á besta liðnum hjá B68. Men hann skal vísa nýggja venjaranum, Frank Skytte, hvør dugur er í honum, áðrenn hann fær fast pláss millum stólparnar. Veteranurin Kjartan Nesá, sum burtursæð frá onkum stuttum tíðarbili hevur verið við, síðani B68 í 1981 kom í bestu deildina, hevur lagt fulla orku í venjingarnar, sum hava verið síðani mánaðarskiftið. Hann hevur nógvar royndir og kennir liðið og spælararnar út og inn. So ein nýggjur og væl yngri maður skal vísa, hvør dugur er í honum, áðrenn hann fær plássið millum stólparnar. Saman við einum øðrum gomlum B68 spælara, Ingolfi Petersen, er Kjartan Nesá hjálpar venjari hjá Frank Skytte.

B68 fer at spæla fyrsta venjingardystin nú sunnu dagin. Hann verður ímóti Skála. Frank Skytte og hansara menn skulu í venjingarlegu á Svangaskarði frá fríggjakvøldinum av, og dysturin ímóti Skála verður endin á venjingarleguni.

Tveir av spælarunum, sum í fjør vóru fastir menn á besta liðnum, eru skaddir. Annar er Arnold Joensen. Tað verður roknað við, at hann verður tøkur aftur um ikki so langa tíð. Hin er Jan Petersen. Hann verður ikki tøkur aftur tær fyrstu nógvu vikurnar. Talan er um ein skaða í hælinum. Jan skal fyrsta dagin leggjast undir skurð. Um alt gongur so væl, sum tað kann, so fer tað at bera til hjá Jan at fara undir aftur venjingarnar átta vikur eftir skurðviðgerðina. Tað vil við øðrum orðum siga, at hann verður ikki tøkur, tá fyrstu umførini í landskappingini vera á skránni.